# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Tað skuldi ein Clinton til at rudda eftir fyrra Bush, og tað skal ein Clinton til at rudda eftir seinna Bush*

*Hillary Clinton*

# I am back

**Eftir ellivu ósigrar á rað vann Hillary Clinton eina sera spennandi valnátt við at vinna í trimum av fýra statum. Nú hevur hon aftur møguleikan at røkka Hvítu Húsunum**



*I am back, rópti ein ovurfegin Hillary Clinton, tá tað var greitt, at hon hevði vunnið í Ohio*

*Mynd: AP*

-Takk Ohio! Vit vita, at amerikanska fólkið atkvøður, soleiðis sum Ohio atkvøður, rópti Hillary Clinton, tá hon í morgun takkaði sínum stuðlum í býnum Columbus. Tað var týðiligt, at hon var fegin um úrslitið, og tað sást, at hon hevði fingið sjálvsálitið aftur, skrivar Reuters.

Teir seinastu dagarnar hevur Hillary Clinton hert álopini á Barrack Obama. Millum annað hevur hon sagt, at hann er ikki nóg búgvin til forsetaembætið. Politiskir eygleiðarar siga, at álopini hava ávirkað fleiri veljarar, og meiningakanningarnar vísa eisini, at meirilutin av teimum, sum tóku støðu í seinastu løtu, valdu at atkvøða fyri Hillary Clinton. Eygleiðararnir vænta tí, at hon fer at herða álopini á Barrack Obama teir næstu dagarnar.

Obama hevur framvegis fleiri valmenn enn Hillary Clinton, og hann hevur eisini meiri pengar til tey seinastu uppstillingarvalini. Fyri Hillary Clinton vóru úrslitini í nátt avgerandi fyri, at hon yvirhøvur kundi halda fram.

Eygleiðarar vænta, at hvørki teirra fer at fáa nóg nógvar valmenn fyri at tryggja sær meiriluta á landsfundinum hjá demokratiska flokkinum í august, og tí kunnu úrslitini í nátt hava við sær, at flokkurin ikki hevur eitt greitt valevni at vísa á, tá landsfundurin verður.

### Obama góðar vónir

Barrack Obama ætlar sær í hvussu er at stríðast til tað seinasta, og hann sigur seg hava líka góðar vónir enn.

-Vit eru líka langt frammanfyri, sama hvat hendir í nátt, og vit eru í ferð við at vinna uppstillingina, segði hann við sínar veljarar í nátt. Tá var úrslitið úr Texas ikki komið, og Obama ynskti Hillary Clinton tillukku við sigrunum í Ohio oh Rhode Island. Sjálvur vann hann í Vermont.

Í Texas bar ikki til at útnevna Hillary Clinton sum vinnara, fyrr enn 75 prosent av atkvøðunum vóru taldar. Hon fær kortini ikki fullan ágóða av sigrinum orsakað av teirri serligu vakskipanini har. Eftir reglunum fáa valevnini tveir triðingar av valmonnunum út frá úrslitinum á uppstillingarvalinum, meðan tann seinasti triðingurin verður valdur á serligum fólkafundum, og her hevur Barrack Obama ein fyrimun, siga eygleiðararnir.

**Eftir valini í nátt sær valmannabýtið soleiðis út:**

**Demokratarnir:**
Barack Obama: 1.451
Hillary Clinton: 1.365
John Edwards: 26
Edwards er givin.

**Republikanararnir:**
John McCain: 1.226
Mike Huckabee: 251
Ron Paul: 21
Mitt Romney: 255
McCain hevur tryggjað sær uppstillingina.

# So hevur McCain tryggjað sær uppstillingina

**Aftan á uppstillingarvalini í gjár er greitt, at John McCain verður forsetavalevni hjá republikanarunum**

John McCain vann sum væntað uppstillingarvalini hjá republikanarunum í Ohio, Rhode Island, Vermont og Texas, og senatorurin úr Arkansas hevur sostatt tryggjað sær teir neyðugu valmenninar til tann endaliga uppstillingarfundin hjá republikanska flokkinum.

Sambært CNN hevur McCain fingið fleiri enn teir neyðugu 1.191 valmenninar. Tað ger, at eingin kann fáa hann aftur, og í morgun boðaði hansara seinasti kappingarneyti, Mike Huckabee, frá, at hann gavst við valstríðnum. Samstundis segði hann seg styðja McCain sum republikanskt forsetavalevni.

Amerikanskir fjølmiðlar skrivaðu í morgun, at George W. Bush, forseti, hevði boðið McCain í Hvítu Húsini at vitja, nú tað er greitt, tað verður McCain, sum skal royna at varðveita Hvítu Húsini á republikonskum hondum.



*Tann 71 ára gamli John McCain hevur nú tryggjað sær uppstillingina*

*Mynd: AP*

## STUTT SAGT

### Zapatero vann

Fyrrakvøldið var tann seinni sjónvarpsdysturin ímillum José Luis Rodriguez Zapatero, forsætisráðharra og andstøðuleiðaran, Mariano Rajoy, undan tjóðartingsvalinum, sum verður í Spania sunnudagin. Aftan á sendingina vísti ein spurnarkanning, at 49,2 prosent av hyggjarunum hildu Zapatero hava vunnið dystin, meðan 29 prosent hildu Rajoy vera tann betra. So stórur er munurin ikki ímillum flokkarnar í meiningakanningunum. Tær seinastu kanningarnar benda á, at sosialistaflokkurin hjá Zapatero fer at vinna valið við fýra prosentstigum framman fyri ta borgarligu andstøðuna.

### Kongur í fongsli

Amerikanski fjølmiðlakongurin Conrad Black er farin undir at sita dómin, sum hann hevur fingið fyri svik. Hann er dømdur hálvt sjeynda ára fongsul og hevur valt at sita dómin í einum fongsli í Coleman í Florida. Í rættinum varð Conrad Black ákærdur og dømdur fyri svik og fyri at hava forðað dómsvaldinum at arbeiða, meðan hann bleiv fríkendur fyri eitt nú skattasvik. Tá Conrad Black var í vælmaktini, átti hann bretska blaðið The Daily Telegraph og fleiri bløð í USA, Kanada og Ísrael. Hann var ein av fremstu stuðlunum hjá Margareth Thatcher, og Henry Kissinger var ein av vinmonnum hansara.

### Góður húsaprísur

Ukrainska Elena Franchuk hevur keypt sær hús í Kensington í London, og sambært blaðnum Daily Mail hevur hon goldið 80 milliónir sterlingpund fyri húsini. Elena Franchuk, sum er kend fyri sítt stríð ímóti eyðkvæmi, hevur tó neyvan goldið alt sjálv. Hon er gift ríkmanninum Viktor Pinchuk, sum sigst hava milliardir í bankanum.